# Sáttmáli

**millum**

**Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

## Grein 1. Sáttmálaøki.

Hesin sáttmáli er galdandi fyri dagrøktarar, sum settir eru eftir hesum sáttmála.

## Grein 2. Starvssetan.

Størvini sum dagrøktarar skulu lýsast leys á almennum góðkendum lýsingarstøðum, undantikin eru tó fyribilshjálp og avloysarastørv.

Tann sum settur verður í starv,skal hava setanarbræv, har ásetingar skulu vera um:

- navn og bústað hjá arbeiðsgevara og dagrøktara,
- starvsetanardagur
- løn og eftirløn
- starvsaldur
- uppsagnarreglur

Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum, fyri limir í Føroya Arbeiðarafelag.

## Grein 3. Børn við serligum tørvi

Áðrenn børn við serligum tørvi koma í dagrøkt, skal avtala gerast við dagrøktara, kommununa og játtandi myndugleikan, um samsýning fyri røkt av hesum barni.

Hugtakið "serligur tørvur" verður í hvørjum einstøkum føri staðfest av játtandi myndugleikanum.

Víst verður til § 5 í løgtingslóg nr. 67 frá 10 mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, við seinni broytingum.

## Grein 4. Arbeiðstíðin.

Arbeiðstíðin er í mesta lagi 48 tímar um vikuna, soleiðis at dagliga arbeiðstíðin skal liggja millum kl. 7.30 á morgni og kl. 17.15 á kvøldi. tó kann onki einstakt barn verða í dagrøktini í longri enn 9 tímar hvønn dag.

Børn, sum eru í dagrøkt hava fastar tíðir, sum er fyrrapart, seinnapart ella allan dagin. Skiftið millum fyrrapart og seinnapart verður eins fyri alla dagrøktina í avvarandi kommunu. Skiftið verður ásett av kommununi, men skal liggja millum kl. 12.00 og kl. 13.00. Arbeiðsviðurskifti, sum ikki eru greitt fastløgd í hesum sáttmála, verða at fastleggja við avtalu millum dagrøktara og avvarandi kommunu.

**Grein 5. Løn.**

Dagrøktarar eru mánaðarløntir soleiðis, at byrjunarlønin fyri fulla starvstíð er sum víst á hjálagdu lønartalvu.

Tann 01.10 2013 hækkar lønin 190 kr. + 0,9%
Tann 01.10 2014 hækkar lønin 1,9%

Starvsaldur verður roknaður hvørt ár. Lønin við øktum starvsaldri er sum víst á hjáløgdu lønartalvu.

Hvørt barn í dagrøktarskipanini, sum er yngri enn 3 ár telur við 25% av mánaðarlønini, og børn eldri enn 3 ár telja við 20%.

Teir dagrøktarar, sum hava færri enn 4 børn í dagrøkt (teirra egnu børn ikki íroknað) verða mettir at verða parttíðarsettir og lønin verður tá 75% av lønini sambært lønartalvuni fyri viðkomandi lønarstig.

Í eini dagrøktarskipan ella í einum parti av eini dagrøktarskipan, har samlaða talið av børnum í dagrøkt er lægri enn 12, kann kommunan avtala við dagrøktara, at lønin verður ásett lutfalsliga eftir talinum av børnum, sum viðkomandi hevur í dagrøkt, tó soleiðis at lønin ongantíð kann verða lægri enn 50% av skalalønini á lønartalvuni fyri viðkomandi dagrøktara.

Í teimum førum har serlig viðurskifti eru galdandi ella, at dagrøktari ikki ynskir at hava fleiri enn 1 –3 børn í dagrøkt, verður lønin roknað út soleiðis sum ásett í hesi grein, í 4. broti.

Ein triðingur av lønini verður goldin sum samsýning fyri slit av heimi og til ábit hjá dagrøktarbørnunum, og verður hesin parturin tí ikki skattaður.

Av skattskyldugu lønini verður goldið eftirlønargjald til lívstrygging og eftirlønarskipanina hjá Føroya Arbeiðarafelag, soleiðis:

Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjaldið, sum er 15,00 %.
Av eftirlønini verður 1,5% lagt omaná lønina, soleiðis at dagrøktarar framyvir sjálvir rinda til kollektivu lívstryggingarskipanina hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Kommunurnar skulu miða eftir, at dagrøktarar, ið ynskja tað, fáa minst 4 børn í dagrøkt.

Um barnatalið hjá dagrøktara verður lækkað, uttan at dagrøktarin sjálvur hevur søkt um hetta, so skal hann tó framvegis hava løn fyri upprunaliga barnatal sítt í minsta lagi 1 mánaða, rokna til ein 1. í einum mánaði frá tí, at fráboðanin er komin, at barnatalið er lækkað.

Fyri børn, sum part av degnum eru í dagrøkt, verður lønin hjá dagrøktara sett í lutfalli til hesa tíð, sum barnið er í dagrøktarheiminum, tó soleiðis at rokna verður bert við hálvum og heilum døgum.

Lønin verður goldin síðst í mánaðinum afturút sambært lønarseðli, sum dagrøktarin fyllir út fyri hvørt barn sær, soleiðis at foreldur ella verjar eisini skulu vátta rættleikan av hesum arbeiðsseðli.

Eingin frádráttur verður gjørdur í lønini fyri frídagar, nevndir í grein 11.

## Grein 6 Gestarøkt

Kommunan kann áleggja dagrøktarum, ið hava eina samanseting av børnum, sum gevur eitt ansingarprosent, sum er minni enn útgoldna lønin, at taka onnur børn í ansing, svarandi til lønina áljóðandi 100% ella 75%, uttan eyka kostnað fyri kommununa.

Samsýning fyri 5 gestarøktir í einum 8 viku tíðarskeiði er íroknað lønini hjá einum fulltíðarløntum dagrøktara. Treytin fyri allari gestarøkt er, at samlaða barnatalið ongantíð fer upp um 5 børn. Hevur dagrøktari 4 børn undir 3 ár í ansing, kann hesin bert taka 1 barn undir 3 ár í gestarøkt. Fyri parttíðarløntar dagrøktarar er sama regla galdandi, tó so, at samlaða barnatalið ongantíð fer upp um 4 børn. Gjørt verður upp fyri 8 vikur ísenn.

Um talið av børnum í gestarøkt hjá einum dagrøktara, í einum 8 viku tíðarskeiði, fer upp um ásetingarnar í 2. broti, so verður goldin upphædd, sum verður roknað lutfalsliga í mun til lønina hjá viðkomandi dagrøktara.

Ansing av børnum í spælistovuni verður bert roknað sum gestarøkt, um samlaða barnatalið í spælistovuni svarar til meira enn 6 børn fyri hvønn fulltíðarløntan dagrøktara/starvsfólk og 5 børn fyri hvønn parttíðarløntan dagrøktara/starvsfólk, sum hendan dagin eru til arbeiðis í spælistovuni. Samsýningin verður so býtt millum teir dagrøktarar/starvsfólk, sum hendan dagin eru til arbeiðis í spælistovuni og samsýningin verður roknað út sambært ásetingini í grein 5, 4. brot.

Eftirlønargjald verður ikki goldið av samsýning fyri gestarøkt, sum gongur út yvir 100% ansing.

## Grein 7 Eftirsitisløn

Tá ið starvsfólk, ið er lønt eftir hesum sáttmála, doyr, meðan tað er í starvi, eigur eftirsitandi hjúnafelagi/samlivandi ella børn undir 18 ár, sum tað hevur skyldu til at uppihalda, rætt til løn í mun til uppsagnartíðina, minst 3 mánaðir, tó hægst 6 mánaðir.

Eftirsitiløn er tann løn, viðkomandi hevði. Lønin í mánaðinum, tá starvsfólkið doyði, verður ikki roknað uppí eftirsitilønina.

## Grein 8. Úrtíðarlønir

Fyri álagt úrtíðararbeiði verður goldin úrtíðarløn afturat vanligu dagtímalønini soleiðis: Fundir o.a. aftaná vanliga arbeiðstíð er at roknað sum yvirarbeiði, og verður fyri hetta goldið dagrøktara tímaløn, sum verður roknað sum 1/2496 av árslønini á 4 stigi.

Fyri 1., 2. og 3. tíman verður goldið 50%.

Fyri 4. og fylgjandi yvirtímar og fyri leygardagar, sunnudagar verður goldið 100%. Úrtíðargjaldið verður latið fyri hvønn byrjaðan hálvan tíma. Sama yvirtíð verður goldin um arbeitt verður teir frídagar, sum nevndir eru í grein 11.

Sagt eigur at verða frá fastløgdum yvirarbeiði dagin fyri. Um so er, at dagrøktari ber seg undan, tá ikki er sagt frá dagin fyri, eigur hetta at verða tikið til eftirtektar.

Verður dagrøktari eftir arbeiðstíð kallaður aftur til arbeiðis, verður samsýnt við 1 yvirtíma eyka.

Dagrøktari kann, í staðin fyri at fáa útgoldið úrtíðarløn, velja at avspáka í sama lutfalli sum nevnt í 3. og 4. broti. Avspákingin skal so fara fram áðrenn 3 mánaðir frá tí at úrtíðararbeiði er útint.

**Grein 9 Legugjald**

Fyri teir tímar, sum liggja uttanfyri vanliga arbeiðstíð, fáa dagrøktarar eina upphædd á 25 kr. um tíman.

**Grein 10. Sjúka**

Um dagrøktari gerst sjúkur, skal hann skjótast til ber boða leiðaranum fyri dagrøktini frá hesum.

Undir sjúku hevur dagrøktarin rætt til stuðul frá dagpeningaskipanini. Kommunan rindar munin millum útgjaldið frá tí almenna og normalønina hjá viðkomandi dagrøktara.

Dagrøktarar kunnu fáa frí við løn, tá barn/børn teirra eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi tilsamans 10 dagar árliga.

Í teimum førum, tá børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur at tað er neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann dagrøktari, um arbeiðsumstøðurnar loyva tí, brúka dagarnar, ið dagrøktari eigur til frí við løn, tá ið barn/børn hansara eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**Grein 11. Fastir frídagar**

Dagrøktarar hava frí hesar dagar: Leygardagar, allar halgidagar, jólaaftan, nýggjársaftan, ólavsøkudag og 1. mai.

Hesir dagar eru hálvir frídagar:
Flaggdagurin, grundlógardagurin og ólavsøkuaftan (aftaná kl. 12.00).

Dagrøktarar kunnu vinna sær rætt til 4,5 eyka frídagar um árið, víst verður til avtalu.

## Grein 12. Skeiðluttøka

Kommunan rindar løn fyri skeiðdagar í samband við faklig viðkomandi skeið, sum verða fyriskipað. Skeiðluttøka fer fram eftir nærri avtalu við kommununa í hvørjum einstøkum føri.

Dagrøktarmammur, sum sita í fakfelagsnevnd hava rætt til at gera felags- og nevndar-arbeiði í vanligari arbeiðstíð, hetta í sambandi við arbeiðsósemjur, sáttmálasamráðingar og arbeiði annars við nýggjum sáttmála uttan lønarmiss. Tó skal kommunan hava fráboðan í hvørjum føri. Fráboðan skal gevast kommununi/dagrøktarleiðaranum beinanvegin, tá nevndarlimur fær fundarboð.

## Grein 13. Frítíð

Frítíð er eftir løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn, við seinni broytingum.

Frítíðarlønin er miðallønin í undanfarna innvinningarári. Haraftrat verður veitt frítíðarískoyti, sum er 1,5% av lønini í sama tíðarskeiði.

Dagrøktarar eiga rætt til serstakt frítíðargjald, sum er 12 % av útgoldnari yvirtíðarløn í undanfarna innvinningarári.

## Grein 14. Uppsøgn.

Dagrøktarar, sum eru settir í starv eftir hesum sáttmála, og sum í meðal hava meira enn 15 tíma arbeiðsviku, er uppsagnarfreistin - tá ikki onnur semja er - frá arbeiðsgevarans síðu henda:
1 mánaða uppsagnarfreist frá einum 1. í mánaðinum at rokna, tá viðkomandi hevur verið í starvi í 6 mánaðir.
3 mánaða uppsagnarfreist frá einum 1. í mánaðinum at rokna, tá viðkomandi hevur verið í starvi í meira enn 6 mánaðir.
Uppsagnarfreistin verður hækkað við einum mánaði fyri hvørji 3 ár, viðkomandi hevur verið í starvi, tó hægst 6 mánaðir.
Uppsagnartíðin hjá starvsfólki, sum eru vald til álitisfólk, verður longd soleiðis, at 3 mánaðir verða lagdir afturat uppsagnartíðini, sum hvørt einstakt álitisfólk hevur innvunnið.
Tá dagrøktari sigur upp, er uppsagnarfreistin - um annað ikki er avtalað - 1 mánaður frá einum 1. í mánaðinum at rokna.
Uppsøgn eftir hesum reglum skal vera skrivlig og latin inn ikki seinni enn hin síðsta í mánaðinum frammanundan uppsagnartíðini.
Føroya Arbeiðarafelag skal hava boð um uppsøgn við nágreiniligari skrivligari grundgeving, og verður uppsøgn ikki givin fyrrenn felagið innan 2 vikur hevur ummælt uppsøgnina.
Verður starvsfólk sagt at fara úr starvi, og er orsøkin eftir felagsins metan ógrundað, tá eiga Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag at taka málið til samráðingar og avgerðar millum sín.
Tá fólk fer úr starvi, fær tað frá viðkomandi kommunu váttan um lønar- og tænastualdur við fráfaring (Lønar og tænastualdurkort).

**Grein 15. Gerðarættur.**

Allar trætur um rætta fatan av sáttmálanum verða at leggja fyri Fastan Gerðarrætt.

**Grein 16. Sáttmálaskeið.**

Hesin sáttmáli fær gildi 01.10.2013, og kann sigast upp við 3mánaðar freist til ein 1. oktober, tó í fyrsta lagi til 01.10.2015.
Partarnir eru samdir um tann 1. oktober 2008 at umrøða § 5 í sáttmálanum, um munandi broytingar, ið hava ávirkan á lønarlagið, eru farnar fram í samfelagnum. Hendan áseting kann ikki føra til, at sáttmálin verður uppsagdur í sáttmálaskeiðnum.

**Grein 17. Góðkenning.**

Hesin sáttmáli er, sambært kommunustýrislógini, treytaður av góðkenning frá Fíggjarmálaráðnum.

**Grein 18. Álitismannaskipan.**

Álitismannaskipanin, sum pr. 11. mai 1999 er galdandi er millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag er eisini galdandi fyri henda sáttmála, soleiðis at hvør kommuna verður roknað sum eitt arbeiðspláss.

Tó skulu dagrøktararnir í kommunum, har 3 ella fleiri dagrøktarar starvast kunnu velja sær álitisfólk

**Grein 19. Sáttmálaeintøk.**

Hesin sáttmáli verður undirskrivaður í tveimum eintøkum, og hvør parturin hevur fingið sítt eintak.

Tórshavn, tann 02.09.2014

Føroya Arbeiðarafelag

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

## Avtala um serstakar frídagar

**§ 1**

Hendan avtala er galdandi fyri dagrøktarar hjá Føroya Arbeiðarafelag.

**Hvussu frídagarnir verða innvunnir og hildnir**

**§ 2**

Stk. 1. Afturat frítíðini eftir frítíðarlógini, vinna dagrøktarar 4,5 frídagar um árið. Serstøku frídagarnir verða innvunnir samsvarandi fasta barnatalinum. (Arbeiðsbrøkinum)

Stk. 2. Serstøku frídagarnir verða innvunnir og hildnir í frítíðarárinum á sama hátt sum frítíð eftir frítíðarlógini.

**§ 3**

Stk. 1. Arbeiðsgevari og dagrøktari avtala, nær í frítíðarárinum serstøku frídagarnir verða hildnir. Serstøku frídagarnir verða lagdir í samráð við dagrøktaran, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Dagrøktari skal boða frá so tíðliga sum til ber, nær ætlanin er at halda serstøku frídagarnar.

Stk. 2. Serstøku frídagarnir kunnu verða hildnir hvør sær, eisini sum hálvir dagar.

**§ 4**

Arbeiðsgevari og dagrøktari kunnu ístaðin avtala, áðrenn frítíðarárið byrjar, at serstøku frídagarnir ella partar av teimum ikki verða hildnir, men útgoldnir, tá ið frítíðarárið er av, jb. punkt 7. Er semja um tað, kann slík avtala eisini verða gjørd í frítíðarárinum.

**§ 5**

Stk. 1. Arbeiðsgevari og dagrøktari kunnu eisini avtala, at serstøku frídagarnir, ella partar av hesum, sum ikki eru hildnir, tá ið frítíðarárið er av, verða fluttir at halda í seinri frítíðarárið.

Stk. 2. Avtalan skal vera skrivlig og avtala skal eisini verða, nær fluttu dagarnir skulu verða hildnir.

Stk. 3. Verður avtala ikki gjørd samb. stk. 1, verða serstøku frídagarnir útgoldnir, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7

**§ 6**

Fer dagrøktari úr starvi, og hevur ikki hildið serligur frídagarnar ella partar av hesum, verða teir útgoldnir, jb. § 7.

**§ 7**

Útgjaldið fyri serstakan frídag er 0,5 % av vunnari løn í undanfarna innvinningarári.

Í útrokningini verður ikki tald við løn, sum er útgoldin í frítíðini, veitt frítíðarløn ella frítíðarískoyti.

Gildiskoma og skiftisreglur

**§ 8**

Avtalan hevur gildi frá 01. oktober 2003.

**§ 9**

Dagrøktarar, sum eru í starvi alt innvinningarárið 2003/2004, tvs. frá 01. apríl 2003 til 31. mars. 2004, hava rætt til 4,5 serstakar frídagar í frítíðarárinum, sum byrjar 02. mai 2004. Hevur dagrøktari verið í starvi minni enn alt innvinningarárið, verða serstøku frídagarnir lækkaðir samsvarandi.